# Lærugreinin føroyskt í tvørfakligu breytarverkætlanini

”Breytarverkætlanin verður skrivað í lærugrein á A-stigi í tvørfakligum samstarvi við eina aðra lærugrein á A-, B- ella C-stigi.”

*Brot úr námsætlanini fyri breytarverkætlanina*

“Báðar lærugreinarnar hava sama rætt til fakliga tyngd, og sjálvt um tyngdin í evninum kann liggja meiri á aðrari lærugreinini – tí fyrru ella tí seinnu – so skal tað í uppgávuorðingin altíð vera greitt tilskilað, hvussu báðar lærugreinarnar eru við til at fremja fakligu málini í uppgávuni.”

*Brot úr skrivi frá MMR (Sámali í Skorini) til skúlaleiðslurnar 7. oktobur 2015*

Lærugreinin føroyskt kann vera onnur av lærugreinunum í breytarverkætlanini, um hon í nóg stóran mun er føroyskfaklig, t.e. fevnir um faklig mál í lærugreinini. Antin skal evnið ella partur av evninum, sum breytarverkætlanin viðger, vera føroyskfakligt, ella skal háttalagið, sum í høvuðsheitum verður brúkt, vera føroyskfakligt.

Dømi um føroyskfaklig evni:

- Føroysk bókmentasøga, heimsbókmentasøga
- Fagrar bókmentir á føroyskum
- Skaldskapur av mannamunni
- Samansettir tekstir av ymsum slag
- Yrkistekstir av ymsum slag
- Málsøga
- Málslig evni av ymsum slag

Tekstir, sum verða viðgjørdir, skulu í høvuðsheitum vera á føroyskum máli (upprunaføroyskir ella týddir). Norðurlendskir (og møguliga aðrir) tekstir kunnu eisini vera evni, um teir verða mettir at vera fevndir av lærugreinini, t.d. heimsbókmentir, sum ikki eru týddar, ella tilfar hjá føroyskum listafólkum á øðrum máli enn føroyskum.

Annað útlendskt tilfar (filmar, yrkistekstir o.a.), sum ikki beinleiðis kann metast at vera fevnt av lærugreinini, kann ikki fatast sum føroyskfakligt evni í breytarverkætlanini.

Dømi um føroyskfaklig háttaløg:

- Tekstgreining
- Samskiftisgreining
- Málslig greining

Um evnið í breytarverkætlanini ikki er føroyskfakligt, ber til at knýta føroysklærugreinina afturat við háttalagnum. Umráðandi er tá, at háttalagið í sær sjálvum hevur ávísa tyngd í verkætlanini, soleiðis at føroyskfakliga tyngdin verður hóskandi.

Talan kann t.d. vera um, at miðlingin av einum evni verður viðgjørd, og at samskiftisgreiningin harvið verður ein stórur partur av uppgávuni. Ella at ávíst skrivingarlag hjá høvundi verður viðgjørt, og at tekstgreining í sær sjálvum verður stórur partur av uppgávuni.

Málið við breytarverkætlanini er, at næmingurin

- skal vísa, at hann megnar at fara til botns í fakinum og at seta seg inn í nýggj faklig øki
- skal vísa, at hann megnar at velja út, nýta og seta saman faklig háttaløg
- skal hava tamarhald á viðkomandi fakligu málum í lærugreinunum, skrivað verður í
- skal velja út, viðgera og skipa týðandi tilfar
- skal vísa, at hann fakliga megnar at bera fram
- til fulnar svarar setta greiðsluevninum (spurninginum) soleiðis at skilja, at samsvar er millum uppgávuorðing og uppgávusvar
- skal hava skil á frásagnarháttinum í eini fakligari uppgávu, t.d. innihaldsyvirlit, endurgeving, notur, keldur, bókmentaskrá o.tíl.

Uppgávuorðingin

- skal vera ítøkilig og avmarkað og í neyvum orðingum lýsa, hvat kravt verður av næminginum, millum annað vavið av uppgávuni, og nøkur viðurskifti – møgulig fylgiskjøl – sum ikki hava verið viðgjørd í vegleiðingini, skulu vera við.
- skal gera tað møguligt hjá næminginum at liva upp til endamálið við verkætlanini
- skal vera lagað soleiðis til tíðarkarmarnar, at næmingurin hevur ein reellan møguleika at svara nøktandi og til fulnar.
- skal vera skipað soleiðis, at næmingurin ikki frammanundan kann hava havt møguleika at skriva partar av uppgávuni niður í smálutir.
- skal hava atlit at teimum hugsanum, ið næmingurin hevur gjørt sær, áðrenn skrivitíðarskeiðið byrjar

*Brot úr námsætlanini fyri breytarverkætlanina*

Uppgávuorðingin skal fevna um tvær ymiskar lærugreinir, sum báðar skulu hava fakliga tyngd í orðingini. Og samstundis, sum tað tvørfakliga sambandið millum lærugreinirnar skal síggjast aftur í uppgávuni, er eisini umráðandi, at lærugreinirnar hvør sær hava sína egnu fakligu tyngd.

Summar lærugreinir hava somu ella líknandi kjarnaøki sum føroyskt, t.d. danskt og enskt. Tá kann avbjóðingin í roynd og veru liggja í at fáa uppgávuna tvørfakliga heldur enn einkultfakliga. Her kann ein loysn vera at gera samanberandi viðgerðir og frásjónargerðir, sum krevja, at báðar lærugreinirnar verða nóg væl umboðaðar.

Ein onnur avbjóðing kann vera at fáa tað tvørfakliga at virka, um lærugreinirnar eru meira ólíkar. Umráðandi er tá, at uppgávan ikki verður ov tvíbýtt. Uppgávan er ikki í nóg stóran mun tvørfaklig, um t.d. eitt søguligt evni verður viðgjørt í einum parti, og ein stuttsøga við sama evni verður viðgjørd í einum øðrum parti.

Heldur kann føroysklærugreinin tá vísa á, hvussu lýsta søguliga evnið hevur ávirkað bókmentasøguna ella ritverkið hjá ávísum høvundi.

# Dømi um uppgávuorðingar, tá onnur lærugreinin er føroyskt

## Føroyskt og átrúnaður

**Tær sjey deyðssyndirnar lýstar í skaldskapi og list**
*Hvussu hevur læran um tær sjey deyðssyndirnar verið nýtt í átrúnaði og listarligum høpi?*

Greið frá teimum sjey deyðssyndunum og uppruna teirra. Síðan skalt tú við støði í frágreiðingini greina og tulka nøkur sjálvvald føroysk listaverk, har læran um deyðssyndirnar kemur til sjóndar. Lýs í hesum sambandi gongdina frá lærusetningi til listarligt úttrykk. Met at enda um útsøgnina hjá Lindhardt um, at gomlu deyðssyndirnar eru vorðnar dygdir í nútíðar mentan.

## Føroyskt og sálarfrøði

**Etingarólag og skaldsøgan *At temja apuna* (2006) eftir Judith Fathallah**
*Hvat er etingarólag, og hvørjar kunnu orsøkirnar vera?*

Greið frá, hvat etingarólag er, og hvørji eyðkennini eru. Við støði í frágreiðingini skalt tú greina og tulka skaldsøguna *At temja apuna* við serligum atliti at persónlýsingum. Met við støði í bókini um, hvørjar orsøkir kunnu vera til, at etingarólag tekur seg upp, og um hvat kann gerast fyri at hjálpa persónum við etingarólagi.

## Føroyskt og sølubúskapur

**Føroyar sum ferðavinnuland**
*Hvussu verða Føroyar marknaðarførdar sum ferðavinnuland?*

Greið frá ferðavinnuni sum vinnugrein í Føroyum. Við støði í frágreiðingini skalt tú vísa, hvussu tveir sjálvvaldir lýsingarfilmar lýsa og marknaðarføra Føroyar sum ferðavinnuland. Met um marknaðarføringina við støði í viðgerðini av lýsingarfilmunum og vís á fyrimunir og vansar.